# Úttøkuskipan til EM á stuttgeil 2025

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi kravtíðarskipan til Evropeisku Meistarastevnuna á stuttgeil sum verður í Lublin í Póllandi frá 2. til 7. desember 2025.

Uppá tal eru tey sum í kravtíðarskeiðnum klára avrik yvir 750 AQUA (2024) stig á stuttgeil (25m).

Sí AQUA 2024 talvurnar her:

- Kvinnur: World-Aquatics-Points-SCM_2024_Female-.pdf
- Menn: World-Aquatics-Points-SCM_2024_Male-.pdf

Vit kunnu í mesta lagi melda fýra (4) svimjarar av sama kyni til hvørja grein, og verða fýra (4) teir skjótastu tí valdir ífall at fleiri enn fýra (4) klára kravtíðina til somu grein.

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at taka út eyka svimjarar, sum lýst í úttøkuskipanini til eyka úttøkur:

https://ssf.fo/kapping/uttokuskipan-til-eyka-uttokur/

Starvsnevndin tilskilar sær hartil rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. januar 2025, og at velja luttøku frá um serligar umstøður tala fyri hesum.

Kravtíðarskeiðið er frá og við 1. sep. 2024 til og við 9. nov. 2025 (FMS/JMS 2025)

Sí annars “Reglugerð um úttøku og kravtíðir”:
http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir svimjarar ið hava klárað kravtíð, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Feløgini verða hartil biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir viðkomandi svimjarar ið *ikki* ynskja úttøku, í seinasta lagi tá ið FM á stuttgeil 2025 byrjar.

Viðkomandi landslið verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er runnið.

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.

Við svimjikvøðu

Starvsnevnd SSF

ATLANTIC AIRWAYS